## Tróndur framsýnir í Fuglafirði

Leygardagin 27. apríl letur Tróndur Patursson upp framsýning í Ribarhúsi í Fuglafirði. Talan er um átta sokallaðar tempramálingar, ið eru málaðir úr einum blandingi av eggum og harpiks, og so fimm verk úr glasi. Hetta eru alt nýggj verk. Sum vanligt eru verkini hjá Tróndi Paturssyni inspireraði úr føroysku náttúruni. Fernisering verður frá klokkan 17 leygardagin.

## Gitikapping

Henda gamla myndin er av Havnarbátinum, men spurningurin er, hvørjir teir eru, ið manna bátin, og nær er myndin tikin? Lat svarið inn til Reyða Kross Føroyar í sambandi við serstakan loppumarknað í Vágsbotni leygardagin 28. apríl. Vinningurin er ein 1. hjálpsskjátta



# Barnagarðslív í Miðvági

**Í barnagarðinum í Miðvági ganga 60 børn. Tey halda til í einum bygningi, ið fyrr var bygdaskúli, og har stórtrívast tey. Tó er nakað av plásstroti, og tí verður farið í holt við at gera nýggjan barnagarð**



*Sjálvt um plásstrot er, trívast børnini væl í barnagarðinum í Miðvági, sum er tann gamli bygdaskúlin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

BARNAANSING

*Rúna Andreassen og Elin Brimnes, praktikantar*

Í barnagarðinum í Miðvági ganga 60 børn. Tey eru býtt upp í fýra stovur ið kallast Spurvastova, Ternustova, Títtlingastova og Loftið.

Í barnagarðinum er altíð okkurt at gera. Teimum dáma øllum væl at ganga langar túrar, tá ið veðrið er gott. Onkuntíð eru tey í høllini í bygdini, og eisini eru tey nógv niðri í fjøruni, ið liggur beint við bygningin, har tey halda til.

14. hvønn dag eru tey inni á ellisheiminum, har tey syngja fyri teimum gomlu. Hetta dáma teimum øllum væl, ung sum gomul.

Tær kreativu síðurnar koma eisini væl til sjóndar. Fyri stuttum fingu stovurnar hvør sítt land, ið tær skuldu arbeiða við og síðani leggja fram. Ein stova hevði um Brasilia, og løgdu fram við Samba-dansi. Tey á stovuni, ið høvdu Kina, lótu seg í sum kinverjar. Eisini vóru Suður Afrika og Afrika á skránni, fortelur ein glað Mirjam Kjølbro, ið er leiðari í barnagarðinum í Miðvági.

**Nýggjur barnagarður**

Tey koma frá dagrøktini til barnagarðin, tá tey eru trý ár og fara til útibarnagarðin í Vatnsoyrum, tá tey eru seks ára gomul.

Sum nú er, er tiltrongt við einum nýggjum barnagarði. Borgarstjórin í Miðvági, Napolion Magnusen, sigur, at gjørt er eitt stór forarbeiði til barnagarðin.

Planeringin er nú í gongd, og ætlanin er, at tað skulu verða fýra vøggustovu- og seks barnagarðsstovur. Pláss verður fyri 150 børnum, og barnagarðurin skuldi helst verðið liðugur um tvey ár.

Dagrøktin verður tá niðurløgd, og í núverandi barnagarðinum verður frítíðarskúli og møguliga eisini ungdómshús; ein sonevnd Margarinfabrikk á Miðvági.

## Fosturtøka orsakað av skeivum kyni

FOSTURTØKA

*Elin Brimnes og Rúna Andreassen, praktikantar*

Ein donsk heimasíða skrivar, at tað nú er gjørligt í Danmark at fáa staðfest kynið á barninum, næstan líka so skjótt sum tað er staðfest, at kvinnan er við barn.

Ein einføld blóðroynd og nýmótans dna-analýsa gera tað møguligt, at vita hvønn lit, tú skalt mála barnakamarið við.

Tvær vikur áðrenn fosturtøkufreistina kanst tú fáa staðfest kynið á barninum, sum ger at møguleikin er at fáa fosturtøku av teirri orsøk, at barnið ikki hevur tað ynskta kynið.

»Ultralydklinikken« í Keypmannahavn er tann fyrsta í Danmark, sum kann bjóða hesa neyvu royndina. Har siga tey, at royndin er gjørd til tey, sum gjarna vilja vita kynið beinanvegin, so at tey kunnu gera klárt til nýggja barnið, ið er á veg.

Fýra av fimm ljósmøðra- og skanningsklinikkum meina tó ikki, at tað er einasta orsøkin. Tey, ið har arbeiða, uppliva, at kvinnur ið eru við barn ofta siga seg vilja vita kynið á barninum í góðari tíð, so tær kunnu fáa eina fosturtøku, um kynið ikki var tað, tær ynsktu.

- Herfyri ringdi ein kvinna til mín og spurdi, um tað var gjørligt at fáa staðfest kynið á fostrinum, ið hon bar, í nóg góðari tíð, so hon kundi fáa fostrið tikið, um so var, at kynið ikki var tað ynskta.

Hon segði, at hon átti longu tríggjar dreingir og hevði ikki yvirskot at fáa ein aftrat, sigur ein eigari av einari ljósmøðra- og skanningsklinikk, sum er ímóti hesi nýggju tøknini.



*Sambært danskari klinikk vilja nógvar kvinnur vita í góðari tíð, hvat kyn fostrið hevur, so tær kunnu fáa fosturtøku, um kynið ikki er tað, tær ynsktu*

## Serstakur loppumarknaður hjá Reyða Krossi

LOPPUMARKNAÐUR

*Rúna Andreassen og Elin Brimnes, praktikantar*

Tú kanst luttaka í gitikapping (sí ovast á síðuni) um at vinna eina 1. hjálpsskjáttu frá Reyða Krossi Føroya. Kappingin er í sambandi við serstaka loppumarknaðin, sum hjálparfelagsskapurin skipar fyri leygardagin 28. apríl frá klokkan 10 til 15.

Loppumarknaðurin verður hildin í hølunum hjá Reyða Krossi í Vágsbotni. Vinningarnir eru grammofonplátur av øllum møguligum slagi; eldri sum yngri. Eisini verður undirhald í Vágsbotni leygardagin. Hanus Johansen syngur og spælir, og Flóvin Jacobsen spælir á harmoniku.

Avlopið av loppumarknaðinum fer til eina verkætlan í Sudan. Henda verkætlanin er eitt samstarv millum Reyða Kross Føroyar og Reyða Kross í Danmark.

*Tá Reyði Krossur heldur loppumarknað í Vágsbotni komandi leygardag, eru vørurnar á hillunum grammofonplátur*

